# Mínar royndir av Orðabókagrunninum við Kára á Rógvi sum formanni

KÁRI DAVIDSEN



**Fimti partur**

Tú manst eiga rættuliga lítið í teirri føroysk-italsku orðabókini (2004), tó at hon er komin fyrst í tínum tíðarskeiði (2003), so henni kanst tú ikki taka tær heiðurin av. Tann 02.05.07 sendir Orðabókagrunnurin tíðindaskriv út í bløðini, har m.a. stendur: "Grunnurin fyrireikar í løtuni orðabøkur millum føroyskt og týskt og millum føroyskt og danskt, men enn vanta orðabrýr (flott nýggjyrði) til onnur stór heimsmál og grannamál, umframt at stórur tørvur er á serligum orðabókum, til dømis skúlaorðabókum, tækniorðabókum og telduorðabókum". So mong vóru tey føgru orðini. Henda nýggja útgávan á netinum er eitt stórt bakkast, borið saman við"Orðaskjáttuna". Tí um tað verður skrivað t.d. "kringur" í Orðaskjáttuna, so kemur ein ørgrynna av uppskotum fram, men um tað sama verður gjørt tað sama við netútgávuna, so koma tvær greinar. Jógvan í Lon Jacobsen, tú ert valdur í nevndina, av tí at tú hevur royndir í einari orðabók, og eg vísti Kára á Rógvu á stavivillu 16.01.08 í bløðunum undir "grátt undir steini", sum á latíni eitur Oniscoidea og "grótlús", sum er sama djór, men hesa ferð verður stavað Oniscidæ. Tveir mánaðir seinni er einki hent. Hvør tykkara hevur ábyrgdina av, at so er? Tú Kári á Rógvi sum formaður ella Jógvan í Lon Jacobsen, sum ert serfrøðingurin í orðabókahøpi?

Undan løgtingsvalinum 19.01.08 setti eg tær nakrar spurningar í somu grein "Orðabókagrunnurin við Kára á Rógvi sum formanni og orðabókagerð." Spurningur 3 ljóðaði: hvussu nógv hevur tann føroyski skattgjaldarin, tín veljari, ígjøgnum Mentamálaráðið goldið Orðabókagrunninum fyri hesi orðabókahandrit?

hví skal tann týskføroyska orðabókin, sum er tann størsta av teimum øllum, og sum er liðug til sítt brúk, fara fyri góðan helvtar prís av hinum orðabókunum?

Uppskot. Tú kanst svara tí føroyska veljaranum alment, tí nú havi eg lagt ein part av hesum sorgarleiki um orðabókagerð fram fyri almenningin, ella nýta mína teldupostadressu, sum tú kennir, og svara privat. Men fyri at tú ikki skalt sleppa undan at svara, so kemur framhald.

Nú er framhaldið so her. Tú hevur enn ikki (torað at) svarað hesum spurningum. Hví? Tá ið tú ikki vilt svara, so skal eg gera tað fyri teg. Føroysk-týskt orðabók hevur fingið 1.868.692 kr., t.v.s. knappar 2 milljónir. Tað er við vælsignilsi frá Mentamálaráðnum, men tað komið eg tilaftur í einari komandi grein. Russisk-føroysk orðabók hevur fingið 1.997.500kr., eisini knappar 2 milljónir. Hvør ið hevur ábyrgdina av henni, kanst tú greiða okkum frá. Donsk-føroysk orðabók hjá Hjalmari Petersen hevur fingið 1,5-2,0 millónir úr Orðabókagrunninum sambært Mentamálaráðið. Hví skal eg so bert fáa góðan helvtarprís fyri mína (950.000kr, 115.000kr ella av fyrstan tíð 120.000kr, sum er væl drúgvari enn hesar tríggjar? Og enn ein spurning, tí tað stendur í reglugerðini fyri Orðabókagrunnin:

**§6**
Roknskaparárið er álmanakkaárið.
**2. stk.** Ársúrslitið verður flutt til næsta roknskaparár.
**3. stk.** Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara, sum nevndin í Orðabókagrunninum velur.
**4. stk.** Roknskapurin saman við grannskoðarafrágreiðing skal fyri 1. juli á hvørjum ári verða sendur Mentamálaráðnum til kunnungar.
**5. stk.** Fyrsta roknskaparár sambært hesum viðtøkum er 2003.

Hvussu ber tað til, at Mentamálaráðið ikki kann upplýsa Jenisi av Rana upp á fyrispurning í Løgtinginum, hvussu stór upphædd er nýtt til t.d. Føroyskdonsku orðabókina og Føroyska tøkniorðabók? Vil tað siga, at hesin orðabókarithøvundurin eisini hevur arbeitt í góðari trúgv og vónað – sum eg, at orðabókahandritini fóru at verða goldin seinni, ella er støðan ikki heldur hon, at orðabókarithøvundurin og hinir báðir nevndarlimirnir eru starvsfelagar og tí hava játtað hesum orðabókum einhvørja upphædd, sum ikki má koma alment fram, tí so verður skommin fullfíggjað.

**Framhald**

# Ljómandi vælferðarlag

**1. mai 2oo8**

Veltu, taðaðu, sáddu og vætaðu
við bløðandi hondum
tó heitum hjørtum
aldingarðin prúða
gróðursettu træið
við sveittan í barm
og brennandi stríðsfýsni

hóast hásummarkrúnan dró
kapitalistiska eiturblandi í seg
so andaði hon reinleika, hugflog
íblástur og stríðsvilja
á tær slitnu, bløðandi hendurnar

undir veingjum kapitalismunnar
fjálgt og gevandi
privatiseringsørskan, stórmennisørskan
hámetta feitilendi
hjá kapitalistunum
rægammunum
spekulantar í hóptatali
eyðræna tilfeingi á sjógvi og landi
mergsúgva almenna peningarenslið
og allar grunnarnar
sum arbeiðandi fjøldin
ár um ár fyllir
við sínum bløðandi hondum
rennur í stríðum streymi
niður í kapitalistatrogið

arbeiðarastættin
vit løntrælir
bundnir á hondum og fótum
tað sindrið vit hava eftir
fer við fúkandi ferð
niður í spekulantapottarnar

kapitalistarnir hava altíð
verið átufrekir
gudur kapitalistsins er ómettandi

**s. 2**

jú, kapitalisturin hevur
mong andlit
úlvur í seyðaskinni
góður og gudrøkin
men tó hvassar kløur
og kaldan heila
kærleiksboðið uttan á skræðuni
rivið og skrætt
kálkaðar gravir
tí næstrakærleikin røkkur bert til
vinningsgreði, eginsinnaða pallsetan og sermerkjan

í fjálgu, lívsjáttandi, prúðu
og hábærsligu trækrúnuni
búleikast frælsisfuglar
bera boð um at vón
er fyri framman
hóast kapitalistiska oyðandi
eitrandi evjudíki við træsins fót

siti saman við kammerátunum
kring træið
lýði á alfagran fuglaljóm, frælsissong,
hvassan stríðsvilja og
ljómandi víðskygda vælferðarlagið
socialistiska krúnan fevnir víða
loysir trælaleinkjur og
úr frælsisløki
træið ótystan seg drekkur

brøðralagsskikkjan droyrreyða
skyggjandi, stríðsfús

kapitalistarnir veingjaskerdir
í fylgi tær fjákutu fínarimpurnar
á ferð við heystarstormunum
á virðisleysum heystarbløðum
saman við vesturlendska vápnaíðnaðinum
øllum oyðandi og drepandi kreftum
meðan øll tey mongu á skuggasíðu lívsins
tey óvirknu og gloymdu
tey fátæku og børnini
svølta, pínast og gráta
hvørva í kapitalismunnar marglætisrúsi

**s. 3**

sá ein almiklan stríðshóp í París, Pætursborg,
Keypmannahavn og á Vaglinum
men nú stendur hann á hillum
dustgingin
men í dag bert nøkur fá tandur
standa og gána á Vaglinum

hevur kapitalistiska skipanin
jarðað stættastríðið ?

í háborg kapitalismunnar vestan hav
er einki stættastríð
tó líða 4o milliónir menniskju
hungur og hall

stættastríði at enda komið
kanska í hugaheimi teirra vælbjargaðu
ognir, virðisbrøv, milliónaskjáttan á tremur
alskyns marglætisfjas
til sín og síni í mong ættarlið

men ikki fyri okkum verkafólk
enn er langt á mál
men verkafólk ! kammerátar !
missi ei móti !
Socialistar ! Standi saman í stríðnum móti
tí karráu kapitalistisku skipanini
og tí turrgelda og oyðandi høgrarákinum !

í eystri brandar
roðandi rættvísisbirtan skæra.
Socialisman vil sigra !

***Sólmundur Joensen***